FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA
Søgu- og samfelagsdeildin

Tórshavn – Juli 2024

# VÆLKOMIN Á SØGU- OG SAMFELAGSDEILDINA (SSD) Á FRÓÐSKAPARSETRINUM

Góði nýggi lesandi á embætisprógvi í løgfrøði.

Hjartaliga vælkomin á deildina.

Her er ein stutt kunning í sambandi við lestrarbyrjanina á Søgu- og samfelagsdeildini.

**Innleiðsla**
Lestrarárið byrjar mánadagin 19. august kl. 9.00 í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum við felags innleiðslu fyri øll nýggj lesandi á Setrinum. Kl. 11.00 sama dag verður farið á Søgu- og samfelagsdeildina.

Innleiðslan á Søgu- og samfelagsdeildini (Jónas Broncksgøta 25) er fyri øll lesandi. Tað hevur stóran týdning, at tit luttaka í hesi innleiðslu, so tit fáa neyðugu kunningina um lesturin, mannagongdir, kunningarskipanir, rættindi og skyldur, reglur og annað, ið er viðkomandi fyri tykkara lestur komandi tvey árini.

Vit gleða okkum til at síggja teg.

Vinaliga

Erika A Hayfileld
Dekanur, Søgu- og samfelagsdeildin

Bárður Larsen
Útbúgvingarleiðari í løgfrøði

# Skrá fyri innleiðsluna á Søgu- og samfelagsdeildini 2024

**Mánadagin 19. august í Kongshøll í Sjóvinnuhúsunum, Vestarabryggja 15**

Tiltakið byrjar kl. 09.15, men tit skulu helst møta eitt sindur fyrr at heinta tykkara lestrarkort uttan fyri Kongshøll.

| | |
|---|---|
| Kl. 09.00 | Skráseting |
| Kl. 09.15 | Rektarin bjóðar vælkomin |
| Kl. 09.25 | Lestrarskrivstovan bjóðar vælkomin |
| Kl. 09.30 | Tónleikur |
| Kl. 09.45 | Stutt røða |
| Kl 10.00 | Lesandi fáa høvi at vitja básar. (Studni, Betri Banki, Landsbókasavnið, Rit og Rák, Ráð Teirra Lesandi, MFS og onnur verða boðin við) |

*Lesandi fara út á deildirnar.*

| | |
|---|---|
| **Kl. 11.00** | **Lesandi fara til SSD í Jónas Broncksgøtu 25, mentorar verða til hjálpar at vísa veg** |
| Kl. 11.15 | Dekanurin bjóðar stutt vælkomin og felags myndatøka. |
| Kl. 12.00 | Lesandi fara hvør við sínum útbúgvingarleiðara inn í undirvísingarhølini og bjóða vit eina lætta máltíð. Her fáa lesandi høvi til at heilsa uppá hvønn annan, útbúgvingarleiðaran og onnur, ið hava eitt serligt tilknýti til útbúgvingina. Útbúgvingarleiðarin kunnar um útbúgvingina, umframt krøv og væntanir til tann lesandi. Hetta er eisini ein góð løta at tosa saman og spyrja um møgulig ivamál.<br><br>Eisini verður rundsýning í bygninginum og høvi at heilsa uppá starvsfólk. |

**Týsdagin 20. august**

Kunnandi tiltak við ymiskum viðkomandi fyrilestrum verður í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum (Vestarabryggja 15) millum kl. 9-11. Endalig skrá kemur seinni.

**Mikudagin 21. august**

Dagur saman við mentorum. Útferð til Nólsoyar. Møtast á Bursatanga kl. 9.15
Báturin siglir úr Havnini kl. 9.30, og vit sigla úr Nólsoy aftur kl. 13.00

Havið matpakka við.

**Fríggjadagin 23. august**

| | |
|---|---|
| Kl. 10.00 -12.00 | KT-vegleiðing í auluni á Námsvísindadeildini (Frælsið 20) – Skipað verður fyri víðkaðari KT-kunning fyrrapartin av degnum, har tey lesandi fáa høvi at sita við telduni og fáa beinleiðis vegleiðing at rita inn í ymisku skipanirnar, sum verða brúktar í útbúgvingini. |
| Kl. 17.00-20.00 | Felags døgurði í Jónas Broncksgøtu, har vit hugna okkum saman, áðrenn farið verður til SetursSamanShow. |
| Kl. 20.00 | SeturSamanShow í Reinsarínum |